# Grundskeið í lóg

Søgu og samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya bjóðar nú út grundskeið í løgfrøði. Skeiðið er skipað sum 56 tímar við tveimum dupulttímum um vikuna. Fýra lógkøn koma at undirvísa, og eru tey Birta Biskopstøð, Jonhard Kletthеggj, Jógvan Elias Winther Poulsen og Kári á Rógvi, og eru tað eisini tey, ið hava riggað nýggja skeiðið til.

Sagt verður í tíðindaskrivi, at lóg er longu partur av nógvum ymsum útbúgvingum. Frálæra um lógarspurningar er partur av flestu fakútbúgvingum, og Náttúruvísindaliga deildin á setrinum hevur nýliga havt lógkunnleika sum part av útbúgving innan oljuverkfrøði.

Hetta er ein roynd at gera eitt alment grundskeið innan lóg, sum skal kunna góðkennast sum partur av ymsum grundútbúgvingum. Fakið er harumframt eisini ætlað teimum, sum í arbeiði ella av áhuga vilja hava ein kunnleika til lóg og juridiskan framferðarhátt. Skeiðið skuldi verið áhugavert hjá fólki í fyrisitingini, í miðlunum, í politikki í vinnu ella øðrum høpi, har ein kunnleiki til lógir er ein fyrimunur.



*28 ára gamli Kári á Rógvi er ein av teimum lógkønu, ið kemur at undirvísa í lóg á Fróðskaparsetrinum*

Dentur verður lagdur á, at skeiðið er fyri fólk, ið ikki eru lógkøn. Tey lesandi skulu læra at finna og lesa føroyska lóg. Harumframt skal skeiðið geva teimum eina almenna fatan av lóg, umframt innlit í nøkur ávís rættarøki.

Fyri at kunna vera við krevst ein miðnámsútbúgving, hægri útbúgving ella viðkomandi royndir.

Skeiðið verður skipað soleiðis, at tey lesandi fáa ígjøgnum dømi í lógum, kunngerðum, dómum og øðrum eina fatan av háttalagnum hjá lógkønum. Venjingar verða eisini, har tey lesandi sjálvi sleppa at finna lógir í bókum, teldum og hjá stovnum. Hesir 56 tímarnir eru skipaðir í tveir høvuðspartar. Í almenna partinum læra tey lesandi, hvussu lógkøn skipa, finna, tulka, meta saman, smíða og royna lóg. Í serliga partinum fáa tey lesandi innlit í stjórnarlóg, fyrisitingarlóg, altjóðalóg, umframt onnur evni.

Tey, ið eru við, skulu skriva tvær uppgávur, sum tey síðani fáa høvi at leggja fram. Tann betra telur 1/3 av próvtalinum. Skrivlig próvtøka telur 2/3 av próvtalinum.

Freistin at tekna seg til skeiðið var tó úti í gjár 6. februar.

## Róðrarneystið tikið alment í nýtslu

MÓTTØKA

Leygardagin 9. februar verður róðrarneystið hjá Kappróðrarfelagnum NSÍ á Glyvrum tikið alment í nýtslu. Í hesum sambandi verður skipað fyri móttøku í sjálvum neystinum. Harumframt verða eisini ymiskt annað á skránni sama dag.

Móttøkan byrjar klokkan 15.00 við almennari móttøku, har Eystankórið og Manskórið syngja. Klokkan 16.30 verður uppboðsøla av myndum og málningum, sum politikkarar og onnur lokal fólk hava málið. Talan er um umleið 20 málningar og myndir. Um kvøldið verður almenn veitsla, har øll eru hjartaliga vælkomin. Hon byrjar klokkan 20.30 í neystinum hjá Kappróðrarfelagnum.

*-ib*

## Símun og Alex á fløgu

ÚTGÁVA

Livandi boðskapurin, sum fyri trettan árum síðani kom út á kassettubandi, kemur nú út av nýggjum – hesuferð sum fløga.

Tá fløgan kom út fyrru ferðina var tað Konoy Music, ið var framleiðari, men hesuferð er tað plátufelagið Tutl, ið stendur fyri útgávuni.

Sum á kassettubandinum eru tað Símun úr Konoy og Alex Bærendsen, sum syngja gospelsangir, sum eru týddir úr enskum til føroyskt. Í flestu førum er talan um umsett løg, sum Elvis Presley sang inn á plátu í síni tíð. Flóvin Tyril úr Norðagøtu hevur umsett næstan allar sangirnar.

Verkið er tikið upp í tónleikastuidionum hjá Regini Bjarnastein í Saltangará.

Á fløguni eru hesi løg: Mín Jesus veit, Mangir bústaðir í Faðirs húsi eru, Kend Harranum bert, Hond hans heldur míni trygt, Tú sást meg gráta í Guds húsi, Skjótt vit endan á lívsvegnum náa, Unga hjarta, Tað tigandi og Gud hin alvaldi álit mítt er.

Tónleikararnir eru Jákup Zachariassen, Pætur við Keldu, Kári Olsen og Godtfred Joensen. John Mortensen og Godtfred Joensen syngja kór.

"Livandi boðskapurin" fæst nú til keyps í flestu tónleikahandlum og eisini øðrum handlum í Føroyum. Nærri fæst at vita um fløguna við at venda sær til Tutl í Tórshavn.

*-ib*




*Alex Bærendsen og Símun úr Konoy koma nú við 13 ára gamla kassettubandinum "Livandi boðskapurin" út í fløguskapi*

# Fróðskaparsetrið harmast um óbeinleiðis skuldsetingar

**Fróðskaparsetur Føroya sigur í tíðindaskrivi, at harmast verður um tær óbeinleiðis skuldsetingar og tað misálit, sum løgtingslimurin fyri Tjóðveldisflokkin, Finnur Helmsdal hevur lagt fram í fyrispurningi til Óla Holm landsstýrismann. Hesar óbeinleiðis skuldsetingar snúgva seg um virksemið á Fróðskaparsetrinum.**

FRÓÐSKAPARSETRIÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Millum annað vil Finnur Helmsdal vita, um tað er nakar útlendskur stovnur, sum góðkennir og eftirmetir vísundaliga arbeiðið á setrinum. Eisini vil hann í sambandið við Menas frágreiðingina vita, um tað er rætt, at henda frágreiðingin ella partar av henni eru á so lágum vísindaligum støði, at hetta ikki er borðbart. Fyrispurningarnir vóru sjey í tali, og settu teir allir spurnartekin við virksemið á Setrinum. Hetta harmast Fróðskaparsetrið um, og sagt verður soleiðis í tíðindaskrivi:

– Nú tingið hevur samtykt, at landsstýrismaðurin skal svara fyrispurninginum, væntar Fróðskaparsetrið at verða biðið um at geva frágreiðing í málinum, sum vit altíð eru til reiðar til.

Frágreiðingin "Study of the Impact of the Developement of Hydrocarbon Resources on the Faroe Islands" hevur verið viðgjørd í fjølmiðlunum fyrr. Enn sum áður galdani, at frágreiðingin er ikki almannakunngjørd, og tískil er enn ikki møguligt at meta um dygdina í henni. Einastu, sum hava møguleika at úttala seg um hana, eru tey, sum vóru við í arbeiðinum. Tað tey hava sagt fer framvegis at standa fyri teirra egnu rokning.

Frágreiðingin varð ætlað at vera ein forkanning, sum skuldi siga nakað um, hvørjar kanningar seinni kundu gerast í eini størri verkætlan.

Fróðskaparsetri frøist um, at løgtingið og limir tess vísa arbeiðinum á setrinum ans.

– Løgtingsllimir eru altíð vælkomnir at vitja á Fróðskaparsetrinum fyri at kunna seg um arbeiðið ella á annan hátt seta seg í samband við Fróðskaparsetrið fyri at fáa fleiri og nágreiniligari upplýsingar um vísundaliga arbeiðið og undirvísingina á stovninum, sigur Fróðskaparsetur Føroya at enda í tíðindaskrivi.

# Uppsøgnin hjá Landsverkfrøðinginum á tingborð

**Løgmaður skal nú greiða tinginum frá avgerðini um at siga Henning Jacobsen úr starvi sum landsverkfrøðingur og um, hví hann ikki varð settur aftur í starvið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

– Hvørji stig fer løgmaður at taka fyri at tryggja sær, at fyristingarligar avgerðir og mannagongdir verða fylgdar samsvarandi ásetingum í fyrisitingarlógini?

– Og hvørja meting hevur løgmaður av rættartrygdini, tá okkara hægstu embætisfólk ferða søgd úr starvi við t. d. bygnaðarbroytingum sum grundgeving, og tað síðani vísir seg at vera talan um okkurt heilt annað?

Hesar spurningar vil Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna Javnaðarfloksins, hava løgman at svara tinginum.

Hon vísir í viðmerkingum til, at Løgtingsins umboðsmaður hevur viðgjørt málið um setan av nýggja landsverkfrøðinginum og kemur til ta niðurstøðu, at Vinnumálastýrið hevur brotið góðan fyrisitingarsið.

– Hetta er serliga galdandi fyri undanfarna landsverkfrøðing, sum eftir at hava starvast á landsverkfrøðisstovninum í 23 ár, 10 ár sum leiðari, varð sagdur úr starvi. Eftir áheitan frá starvsfólkunum á stovninum taldist hann millum umsøkjararnar. Starvið varð sett, uttan at nakar av teim sjey vrakaðu umsøkjarunum fingu nakra grundgeving fyri, hví teir ikki fingu starvið, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Sambært fyrisitingarlógini skal ein avgerð, sum verður fráboðað skrivliga, hava grundgeving, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.

Vísandi til § 33, stk.3 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, sum sigur, at tað er løgmaður, sum hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt, setir Katrin Dahl Jakobsen fram spurningin.



# FastLán við fastari rentu



*Johnny Jacobsen, v.m., og Janus Petersen frá Føroya Banka meta lán við fastari rentu vera ein góðan handil fyri privat viðskiftafólk*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Húsaeigarar fáa nú møguleika at taka lán við fastari rentu yvir eitt tíggju ára áramál. Talan er í veruleikanum um eina trygging til lántakarar, og hetta vil eisini virka stabiliserandi fyri føroyska búskapin, ljóðar tað úr Føroya Banka, sum fer at bjóða hetta lánitilboðið til síni viðskiftafólk**

LÁNSVEITAN
*Heri á Rógvi*

Tað verður nú møguligt hjá føroyskum lántakarum at taka eitt lán, sum í tíggju ár hevur somu rentu. Tað er Føroya Banki, sum bjóðar sínum viðskiftafólki at taka upp lán við fastari rentu. Tað eru privatu viðskiftafólkini, sum eru málbólkurin við hesum tilboðinum, har tað serliga eru húseigararnir, sum væntandi síggja nakað áhugavert við hesum tilboðnum.

Áður hevur tað bert verið møguligt at taka eitt lán við skiftandi rentu. Hetta merkir, at rentan skiftir alt eftir, hvussu fíggjarútlitini eru. Størsta ávirkanin á hetta kemur úr danska fíggjarheiminum, og harvið úr evropeiska fíggjarheiminum osfr. Hvussu skiftandi rentan háttar seg hava føroyskir peningastovnar sum so ongan ávirkan á. Í løtuni liggur rentan á teimum vanligu annuitetslánunum um 5%. Rentan á teimum nýggju FastLánunum er sum nú gott 6,5%. Hetta er 1,5 prosentstig hægri enn á skiftandirentulánunum.

– Dentur verður fyrst og fremst lagdur á, at fastlán er ein trygg loysn – serliga fyri tey, sum hava nógv at gjalda og haraftrat hava ein við viðbreknan tøkupening, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Teir í Føroya Banka leggja alstóran dent á, at hetta er ein trygg loysn fyri lántakararnar, men eisini fyri føroyska búskapin sum heild.

– Uppgangandi rentur fáa álvarssamar fylgjur fyri búskapin hjá tí einstaka húskinum og eisini hjá føroyska búskapinum sum heild. Við hesum lánsforminum verður møguligt at stabilisera hjá tí einstaka húsarhaldinum, soleiðis at tey hava fasta útreiðslu, og harvið kunnu tillaga sín egna fíggjarliga rakstur eftir hesum, sigur Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka.

Nýggir lánstakarar fáa møguleikan at velja ímillum vanligu lánini við skiftandi rentu ella hendan nýggja møguleikan. Í tíggju ár kunnu kundarnir sostatt gjalda somu rentu. Eftir at tey tíggju árini eru farin, so verður møguligt hjá teimum at leggja láni um til skiftandi rentu ella fáa nýggja fasta rentu ásetta.

– Vit hava valt at gjørt tað fyrst yvir tíggju ár, tí vit meta, at fólk eru komin undan tí ringasta av skuldini tá, og tey kunnu sostatt skipa síni fíggjarviðurskifti betur, sigur Janus Petersen.

Lánini verða bjóða út sum 1. veðrættar annuitetslán.

### Kent aðrastaðni

Hóast hetta hugtakið við fastari rentu er nýtt í Føroyum, so er hetta langt frá nýtt í londunum rundanum okkum. Hjá borgarunum í ríkisfelagnum Danmark verða 80% av sethúsalánunum rentaði við fastari rentu. Í Føroyum eru einstøk vinnulán rentaði við fastari rentu, har serstøk avtala er gjørd í hvørjum einstøkum føri.

Stjórin í Føroya Banka veit at siga, at fleir fólk, og serliga tey, sum hava verið búgvandi uttanlands, venda sær til bankan og spyrja eftir lánum við fastari rentu.

– Vit hava merkt ein veksandi eftirspurning, og vit mettu tí, at tíðin var búgvin til at taka hetta stigið. Hetta hevði ikki borið so væl til fyri 10 árum, tá innlánsrentan var rættiliga høg, og búskapurin var munandi óstabilur. Tann danski fíggjarmarknaðurin hevur gjørt stór framstig, og tað ber eisini til at siga, at vit við hesum taka eitt fet tann modernaða vegin, sigur Janus Petersen.

Leiðslan í Føroya Banka undirstrikar, at hetta er eitt tilboð til lántakarar, men borðið fangar ikki, sum teir taka til.

– Lántakarin varðveitur møguleikan til altíð at kunna umleggja til lægri rentu, um rentan skuldi lækkað enn meira. Vit geva við hesum trygd við fastari húsaleigu, men eisini frítt at velja, sigur Janus Petersen.

Johnny Jacobsen veit at siga um fleiri føri, har føroyingar eru komnir illa fyri við at taka donsk lán, har rentan gjørdist ovurstór, men við hesum kann tann einstaki lánstakarin fáa eitt nógv tryggari lán.

Spurdur um, hvussu hetta fer at ávirka Føroya Banka, so væntar stjórin, Janus Petersen, ikki at hetta fer at ávirka nakran veg.

– Hetta verður sum so ikki fíggja við innlánum, og vit vinna sum so tað sama burturúr hesum sum við skiftandi rentu, tá ið vit liva av rentumuninum millum innlán og útlán, sigur Janus Petersen.

Tað einasta neiliga árini, ið kann hugsast kann vera, at peningarenslið ikki fær veksandi aktivitet, og harvið ávirkar búskaparvøksturin, men hetta er kortini ikki nakað, ið leiðslan í Føroya Banka er stórvegis bangin fyri.

### Á veg upp

Serfrøðingar innan bankakervi eru at kalla á einum máli um, at rentan innan eitt ár fer at hækka. Rentan er í løtuni á einum søguliga lágum støði, og hetta eru flestu vísmenninir samdir fer at broytast innan langa tíð. Í løtuni verður eitt FastLán givið við einari rentu áljóðandi 6,5%, og hetta kann hugsast at gerast ein góður handil. Tann "fasta" rentan er tó ikki meira føst enn sum so, at hon kann broytast í komandi viku, um tað skal vera, men bert fyri tey, ið tekna lán tá. Hetta skyldast, at lánini hátta seg eftir danska fíggjarmarknaðinum.

Føroya Banki vísir á, at einstaka húsarhaldið verður hart rakt av rentuhækking, og sethúsaprísirnir eru somuleiðis ógvuliga rentuviðkvæmir, sum tikið verður til.

Í Danmark er støðan tann, at fólk eru farin at lána sum gekk verðin undan, og hetta eru eisini nógv lán, ið ikki hava fasta rentu. Kemur tann væntaða rentuhækkingin, so fer hetta at raka danska búskapin ógvuliga hart.

- Vit hava í løtuni helvt um helvt privat og vinna á okkara útlánum, so teir privatu spæla ein sera stóran týdning fyri okkum, og vit vilja eisini markerað okkum við einum tílíkum tilboðið afturat, sigur Janus Petersen at enda.

Bjarni Olsen:

## Bæði gott og ringt

*Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa, hevur fyribils ongar ætlanir um at bjóða lán við fastari rentu til privatar kundar.*



**– Tílík lán við fastari rentu kunnu vera bæði góð og ring fyri búskapin. Vit koma ikki við einum tílíkum tilboði í nærmastu framtíð, sigur Bjarni Olsen, stjóri í Føroya Sparikassa**

LÁNSVEITAN
*Heri á Rógvi*

Annar av stjórunum í Føroya Sparikassa og fyrrverandi formaðurin fyri búskaparráðið, Bjarni Olsen, kennir til tankan um lán við fastari rentu. Hann sigur tó, at Føroya Sparikassi ikki kemur við einum líknandi tilboðið í allarnærmastu framtíð, men teir fylgja væl við, hvat kappingarneytarnir gera, sum hann tekur til.

– Marknaðuri í Føroyum er ein heilt annar, enn hann vit kenna úr Danmark, og sostatt hevur ikki verið ráðiligt at geva eitt tílíkt tilboð, sigur Bjarni Olsen.

Í løtuni bjóðar Føroya Sparikassi bert ávísum vinnukundum lán við fastari rentu.

– Ein skipan við fastari rentu hevur síni plus og síni minus. Tað kann vera ógvuliga gagnligt við einari tílíkari fastarirentuskipan, men tað kann eisini vera gott at kunna stýra búskapinum við skiftandi rentu. Tað finst einki einfalt svar upp á tann spurningin, sigur Bjarni Olsen.

Stjórin í Føroya Sparikassa kennir ikki nógv til, at fólk spyrja eftir lánum við fastari rentu, men hann nevnir, at teir sjálvandi hyggja eftir møguleikunum at bjóað eina tílíka lánsskipan, sum Føroya Banki nú ætlar sær at bjóða.